# fyri 90 ára gomul



skering, seyming, binding, hekling, patcwork, brodering, bókbinding, smíð, dreying, skera í træ, gera modelbátar og skip, umvæla og polstra gamlar møblar. Harumframt er frálæru í svimjing, fimleiki, talv, matgerð, ættargransking, teldulæru, dansi, drama/sjónleiki, støddfrøði, føroyskum, donskum, íslendskum, enskum, fronskum, sponskum, russiskum, tónleiki, kórsangi v.m.

M.a annað fíggjar kvøldskúlin meginpartin av virkseminum hjá GHM, Havnar Hornorkestri, Havnarkórinum, kórinum Glymur, Kamarkórinum, og kórinum Sólarmagn. Herumframt fíggjar kvøldskúlin størsta partin av tónleikavirkseminum í Margarinfabrikkini og sjónleik/drama á Dramaverkstaðið á Hálsi.

## Hjálp til tilflytarar

Í vár var ynski sett fram á stevnu í Miðlahúsinum um at hjálpa tilflytarum, sum koma til landið, soleiðis at tey kunnu klára seg í dagligdegnum og í samfelagnum sum heild. Serliga verður hugsað um grundleggjandi kunning um samfelagsstovnar og líknandi. Hetta eru fólk við ongum kunnleika til land- fólk og samfelagsbygnað. Tí verður skeiðið “føroyskt og samfelagskunning fyri tilflytarar” boðið fram sum almenn lærugrein.

Aðrar nýggjar lærugreinir eru m.a : “at liva við og í náttúruni”, “lívsstílur og fólkaheilsa” og “sniðgeving”. Tilsamans bjóðaði skúlin 13 nýggjar lærugreinir út skúlaárið 2007/08.

Eftir nógva prátið, sum hevur verið um PISA kanningina, hevur skúlin roynt at seta fokus á foreldur og bjóðaði tí fram millum annað foreldrastøddfrøði, lesing og rættskriving, men her var ov lítil undirtøka. Kjakið í sambandi við nýggjasta PISA kanningin fer kanska at vísa á tørvin, so undirtøkan kann gerast størri.

## Listaskúlin

Í Listaskúlanum er tilevning, tekning, modeltekning, máling, postalínsmáling, leirarbeiði, grafikkur, bein- og hornarbeiði, steinslíping og silvurarbeiði, videolæra, foto og mangt annað. Sum nakað nýtt verður fer undirvísingin í foto eisini at fevna um digitala viðgerð av myndum og øðrum. Úrslitið av virkseminum innan listarliga økið sæst best aftur í várframsýning skúlans.

Meiri vitan um kvøldskúlavirksemið sum heild fæst við at lesa faldaran sum bleiv borin út í hvørt hús í Tórshavnar kommunu. Eisini hevur tú møguleikan at fara inn á heimasíðuna hjá Tórshavnar kommunu www.Torshavn.fo og velja mentan og skúlar.

Í januar ella februar mánaði komandi ár fær kvøldskúlin nýggja heimasíðu.

## Avbjóðingar

Við hesum stóra virksemi fylgir eisini hølistrupulleikar. Tað mest akutta er skrivstovuhøli og høli til skeiðið “at loysa úr lagdi”. Tó skal sigast, at arbeitt hevur verið í nógv ár við at fáa skúlanum betri karmar og at fáa ein samlaðan skúla, tó uttan at fáa ta politisku vælvild sum hetta krevur. Við einum samlaðum skúla hevði møguleiki verið fyri at skapt eitt livandi hús og umhvørvi, har aktivitetur var alt árið. Skrivstovan er opin alt árið og í tíðarskeiðnum, tá ið vanliga kvøldskúlaundirvísingin ikki er, er ætlanin at hava summarskeið, fyrilestrar, prógvhandanir og onnur tiltøk, eins og verkstøðini kunnu nýtast til skeiðsvirksemi og vitjandi listafólk. Ein samlaður skúli hevði verið ein miðdepil, sum kemur at vera sjónligur í umhvørvinum og til gagns fyri allar borgarar í framtíðini.

Tað sær í løtuni út til, at býráðslimirnir eru áhugaðir fyri at veita kvøldskúlanum betri sømdir í spurninginum um nøktandi hølir.

## Kvøldskúlin eigur at stuðlast meira

Kvøldskúlin í Havn er nógv størsti skúlin í landinum, tá ið hugsað verður um næmingatal. So nógv sum 4. – 5. hvør borgari í Havn hevur samband við skúlan.

Hvussu nógv, ið kann fáast burtur úr kvøldundirvísingni sæst á teimum framsýningum, sum plaga at vera eftir, at skúlárið er liðugt. Tað kann stutt sigast, at tað er ikki smávegis, ið kemur av skafti, og tá er hetta bert fyri tær handligu lærugreinirnar.

Stórt sæð kann sigast, at kvøldskúlarnir yvirhøvur eru væl umtóktir millum fólk.

Í Danmark plaga fólk ofta í fjølmiðlunum at argast um, at nógvar lærugreinir eru “fjas”, men slík sjónarmið hoyrast neyvan í Føroyum.

Vanligu kvøldskúlarnir verða fíggjaðir við brúkaragjaldi og almennum tilskoti. Gjaldið hjá næminginum kann ikki vera so høgt, at fólk setast aftur. Hetta gjald er í ár í miðal upp til kr. 680. Hetta er ein rímiligur prísur, og eigur ikki at vera hægri.

Havast má í huga, at kvøldskúlin kann vera við at halda tey ungu burtur frá einari “skeivari” lívsleið og geva teimum tilkomnu og eldru eitt gott lívsinnihald í felagsskapi við onnur.

Hetta er eisini við til at skapa lív í býnum um kvøldarnar til felags trivna fyri allar borgarar í Tórshavnar kommunu.

Tí er tað nokk so umráðandi, at politisku myndugleikarnir hava hetta í huganum, so teir ikki gerast smáligir á hesum økinum.

Her er talan um eina íløgu, sum so ella so kemur aftur, eisini hjá næmingum, sum verða 90 ár!





*So snøgt kann tað gerast*



*Hesi starvast á skúlanum, f.v. Kira Hendriksdóttir, Malan Guttesen og Jákup Strøm, skúlastjóri*